




# Stjórnin skal virða løgtingssamtyktir

**Tá løgtingið hevur samtykt, at hernaðarliga revsilógin skal takast av fyri Føroyar, so eiga danskir myndugleikar at virða tað og ikki seta eina nýggja lóg í gildi. Tað sigur Heðin Mortensen, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, sum fer at taka málið uppaftur**

HERNAÐARMÁL
*Ingi Rasmussen*



*Heðin Mortensen hevur tikið pennin framaftur og ætlar at reisa málið um hernaðarlógina aftur á løgtingi. Hann er misnøgdur vi ta vend, sum málið um deyðarevsing í Føroyum tók. Vit eiga ikki at góðtaka, at stjórnin handlar ímóti einari løgtingssamtykt, sigur hann*

*Mynd: Jens K. Vang*

Samtyktirnar hjá løgtinginum eiga at verða virdar.

So avgjørdur er Heðin Mortensen, løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin, nú danska stjórnin beint ímóti einari løgtingssamtykt setir donsku hernaðarligu revsi- og rættargangslógina í gildi fyri Føroyar. Hann er alt annað enn nøgdur við ta vend, sum málið um deyðarevsing í Føroyum hevur fingið.

Tann gamla lógin frá 1937 loyvir deyðarevsing í krígstíð. Danmark er í kríggi við Irak, og tí er deyðarevsing teoretiskt galdandi í Føroyum beint nú. Løgtingið samtykti einmælt 22. november 2001, at gamla lógin skal takast av, men tað hevur drigið út.

Tað fekk Heðin Mortensen at taka málið fram aftur á løgtingi. Hann vildi hava ríkisumboðið at svara, hví tað tekur so langa tíð at seta løgtingsins vilja í verk.

Nú staðfestir Heðin Mortensen, at tað skyldast seinføri frá danskari síðu, men hann leggur eisini ábyrgdina á landsstýrið, sum átti at rykt eftir málinum.

### Tikin á bóli

Nú hevur málið so fingið eina heilt aðra vend, enn løgtingið hevði ætlað. Danska stjórnin hevur sett nýggju hernaðarligu revsi- og rættargangslógina frá 1973 í gildi í Føroyum, beint ímóti viljanum hjá landsstýrinum og løgtinginum, sum samtykti, at vit als onga hernaðarlóg skulu hava.

– Vit vistu als ikki av, at tað varð gjørt á handan hátt. Vit trúðu, at stjórnin fór at taka gomlu lógina av, sum løgtingið bað um. Eg dugi ikki at síggja, at vit skulu hava nakra hernaðarliga revsilóg fyri Føroyar. Vit hava hvørki egið hervald ella herskyldu. Lógin er eina og aleina ætlað til danska hervaldið, og tað kann skipa síni viðurskifti við innanhýsis reglum og lógum, sigur Heðin Mortensen.

Síðsta orðið er ikki sagt í málinum, tí Heðin Mortensen ætlar at taka málið uppaftur í løgtinginum.

### Tekur málið upp

– Eg sá ikki, fyrr enn Sosialurin skrivaði tað, at málið var komið so langt av kós. Nú nýggja lógin kemur í gildi, verður deyðarevsingin loksins tikin av, og tað kunnu vit so sjálvandi fegnast um, nú kríggj er. Men málið flýtur og reisir eisini nakrar álvarsamar spurningar, og tí fari eg taka tað uppaftur, sigur Heðin Mortensen.

Fyri hann snýr tað seg nú um, at løgtingssamtyktin um at avtaka hernaðarligu revsilógina verður vird. Sostatt er hetta ikki eitt stríð millum loysing og samband í Føroyum um viðurskiftini við Danmark. Tað er heldur eitt stríð hjá løgtinginum fyri, at tess samtyktir verða tiknar fyri fult.

– Eg ætli at fylgja málinum upp, so tað verður avgreitt nøktandi fyri føroyingar. Nú eiga vit at taka spurningin upp, um vit vilja hava hernaðarligu revsi- og rættargangslógina í Føroyum. Eg haldi rætt og slætt, at vit skulu krevja, at hon skal takast av, tí hon er bert til hernaðarlig endamál, og so er ongin orsøk til, at hon skal galda fyri føroyingar, sigur Heðin Mortensen.

# Avtøka av likamligari revsing av børnum fær óvæntað mótspæl

**Tað ber ikki til at avtaka rættin hjá foreldrum at revsa børn likamliga fyri seg, sigur danska løgmálaráðið í einum skrivi til Rættarnevndina hjá løgtinginum**

BØRN OG REVSING
*Ingi Rasmussen*

Tað skal ikki vera loyvt at revsa børn likamliga.

Tað er aðaltankin í einum uppskoti, sum Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna, hevur lagt fyri løgtingið vegna Javnaðarflokkin. Hon vil hava sett inn í lógina um foreldramyndugleika og samveru, at barnið hevur rætt til umsorgan og tryggleika, skal virðast og má ikki útsetast fyri likamliga revsing ella aðra niðrandi viðferð.

Uppskotið er ein liður í at javnseta rættindini hjá føroyskum børnum við tey í grannalondunum, har øll likamlig revsing er bannað. Í Danmark er likamlig revsing bannað við lóg, men ríkislógirnar eru ikki dagførdar í Føroyum.

Uppskotið fekk góða móttøku í løgtinginum, men líkt er kortini til, at tað verður køvt í føðingini. Eftir fyrstu viðgerð í løgtinginum, varð málið beint í rættarnevndina. Rættarnevndin hevur spurt seg fyri hjá danska løgmálaráðnum, og haðani hevur uppskotið fingið óvæntað mótspæl.

Í einum notati skrivar løgmálaráðið, at um føroyingar ynskja at avtaka revsirættin av børnum í Føroyum, kan tað bert gerast, um øll danska lógin um foreldramyndugleika við seinni broytingum verður sett í gildi í Føroyum.

Tað er ikki hetta, sum løgtingið hevur biðið um, og tí er óvist, hvat hendir við málinum í løtuni. Løgmálaráðið ger kortini vart við, at tað longu hevur gjørt eitt uppskot til eina fyriskipan, sum setir í gildi alla ta donsku lógina um foreldramyndugleika, ið millum annað inniheldur avtøku av likamligari revsing av børnum.

## Fíggjareftirlitið tagnarskyldu

Virksemið hjá Fíggjareftirlitinum er undir tagnarskyldu. Og tí ber ikki til hjá Fíggjareftirlitinum at geva Føroya landsstýri almenna kunning um peningastovnarnar í Føroyum.

Hetta sigur Bendt Bendtsen, búskapar- og vinnumálaráðharri, í einum svari til Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmann, sum hevur sett fyrispurning fram í Fólkatinginum.

Tórbjørn Jacobsen spurdi, hvørji stig danski ministarin ætlaði at taka, so føroyingar fingu fult innlit í frágreiðingarnar hjá Fíggjareftirlitinum um støðuna hjá føroysku peningastovnunum.

Bendt Bendtsen vísir til lógargrundarlagið hjá Fíggjareftirlitinum, sum eisini byggir á ES-lóggávu. Men í heilt serligum førum, har Føroya landsstýri skal taka støðu til eina játtan til kreppuraktan peningastovn, hevði tað kanska ikki verið av vegnum at givið trúnaðarupplýsingar, sigur ráðharrin.

Annars upplýsir hann, at hann fer at bjóða Karsten Hansen, landsstýrismanni, til ein fund um yvirtøku av málsøkinum »Penge- og kreditvæsen«.

-ir

## Rosalie skift ráðharra

Tað tekur eitt sindur longri tíð enn væntað at fáa svar í málinum um Rosalie Thomsen, sum er víst úr Føroyum.

Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, setti Lene Espersen, løgmálaráðharra, fimm spurningar í Fólkatinginum. Hann vildi m.a. hava at vita, hví filipinska Rosalie Thomsen varð víst úr Føroyum, hóast hon hevur varandi uppihaldsloyvi í Danmark og er gift føroyingi.

Svar plagar at vera givið innan eina viku, men nú hava donsku myndugleikarnir sent fyrispurningin víðari. Nú er tað Bertel Haarder, sum er integratiónsministari, ið skal svara fyrispurninginum.

-ir